Vikuskiftis Sosialurin


## Klassisk konsert

Sunnudagin verður klassisk konsert í høllini í Norðurlandahúsinum. Tað eru teir báðir Nikolaos Kapnas á violin og Jóhannes Andreasen á klaver, sum fara at hava konsertina. Teir fara at spæla sonatir eftir Johann Sebastian Bach, Wolfgang Amadeus Mozart og Ludwig van Beethoven. Konsertin byrjar kl. 16.00 sunnudagin.



## KT-risi fingið navn

Fyri ikki so langari tíð síðani gjørdist greitt, at tríggjar av stóru føroysku fyritøkunum innan KT og samskifti løgdu saman. Talan er um Farodane, Com-Data og ReproZ, og nú hevur nýggi KT- og samskiftisrisin fingið navn. Nýggja samtakið fer at eita NEMA, og KT-parturin hevur fingið navnið SENTA. Hinar fyritøkurnar í samtakinum eru CASA, ið selur designinnbúgv til heim og skrivstovur, City, ið er heildarveitari av skrivstovuútgerð til privatfólk og vinnulív, skeiðsdepilin Kvasir og lýsinga- og samskiftisfyritøkan ReproZ.

# Kenni meg meiri sum

**Eftir 25 ára starvstíð í grannskoðaravirkinum Rasmussen & Weihe, hevur Klaus Rasmussen nú gjørt av at royna nýggjar leiðir. Hann hevur búð snøgga helvt av lívi sínum í Føroyum, og nú hann flytir niður til Amager við familju síni, kennir hann seg meiri sum føroying enn dana. – Eg havi størri familju í Føroyum enn í Danmark, sigur Klaus, sum enn ikki hevur gjørt av, hvussu framtíðin skal síggja út**



*– Skal eg renna í mínum tjóðarbúna, so má eg í býin at keypa mær eina troyggju í føroysku litunum, sigur Klaus Rasmussen, ið hevur búð helvtina av lívinum í Føroyum*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

SAMRØÐA

*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Í ár eru liðin 25 ár síðani Klaus Rasmussen sum nýútbúgvin cand.polit kom til Føroya. Hann fekk starv hjá Carl Wilhelm Weihe sum grannskoðari, og nú hann leggur frá sær, er tað sum stjóri og eigari av meginpartinum av fyritøkuni.

Men hvussu bar tað til, at hann kom til Føroya av fyrstan tíð?

- Tað komst av tí, at eg hitti eina føroyska gentu í 1979, Ann Mari Olsen. Tá eg so var liðugur við útbúgvingina, gjørdu vit av at flyta til Føroya, sigur Klaus Rasmussen.

Tey vóru samd um, at skuldu tey royna at búgva í Føroyum, skuldi tað vera beinanvegin, sum Klaus varð útbúgvin, og tað royndu tey so. Men áðrenn tey komu til landið vildi Klaus tó tryggja sær eitt starv, so hann fekk nøvnini á fleiri fyritøkum, og hann mundi senda eini 40 umsóknir, metti hann.

- Men tað var bara ein fyritøka, sum hevði brúk fyri mær, og tað var Carl Wilhelm Weihe. So har endaði eg, sigur fráfarandi stjórin.

Upprunaliga ætlanin var bert at vera í Føroyum í eini tvey ár at byrja við, men tey trivust so mikið væl, at tey eru her framvegis. Serliga var tað Klaus, sum fall væl til, tí hann íðkaði fótbólt, og fekk tí beinanvegin vinir í B36. Eisini á arbeiðinum kom hann í samband við nógv fólk.

Hjá Ann Mari var støðan eitt lítið sindur øðrvísi, tí eftir átta árum í Danmark vóru gomlu vinirnir spjaddir fyri vág og vind, og høvdu í fleiri førum stovnað egna familju, og tá hon samstundis var heimagangandi, var tað hon – hóast hon er føroyingur og familjan var her – sum treivst verri.

Og soleiðis hevur tað í grundini verið øll árini. Klaus hevur dámað betri í Føroyum enn Ann Mari, og tá nakar hevur tosað um at flyta til Danmarkar, hevur tað verið hon.

### Niður- og uppgangstíðir

Carl Wilhelm Weihe stovnaði sína fyritøku í 1968, og hevði tí virkað í 14 ár, tá Klaus Rasmussen byrjaði har. Hann treivst ógvuliga væl í starvinum, men av tí at hann var útbúgvin sum cand.polit, samfelagsbúskaparfrøðingur, og skuldi hann gera sær vónir um at koma víðari innan grannskoðan, mátti hann útbúgva seg innan økið.

So 5-6 ár eftir at hann byrjaði, fór hann at lesa til statsautoriseraðan grannskoðara samstundis, sum hann passaði sítt dagliga starv. Júst um hetta mundi byrjaði stóra bankakreppan, sum menti seg til eina samfelagskreppu av teimum stóru.

Og árið eftir, at kreppan toppaði í 1992, varð Klaus Rasmussen útbúgvin sum statsautoriseraur grannskoðari. Hann gjørdist samstundis partnari og stjóri á sama føti sum Carl Wilhelm, og í hesum sambandi skifti fyritøkan eisini navn til Rasmussen & Weihe.

- Hetta vóru niðurgangstíðir, og tað merktu vit eisini við minkandi umsetningi. Men hetta megnaðu vit væl at koma ígjøgnum, tí virkið hevur altíð verið ein væl stovnsfest fyritøka, so tað merktist ikki so ógvusligt fyri okkara viðkomandi, sigur Klaus Rasmussen.

Síðani hevur Rasmussen & Weihe vaksið seg til tað, fyritøkan er í dag við 28 starvsfólkum. Og nú er eisini nýútbúgvin statsautoriseraður grannskoðari í fyritøkuni, nevniliga Hans Laksá, so nú kendi Klaus, at hann stóð fríari at søkja nýggjar avbjóðingar.

Og eftir at hava hugsað seg um í drúgva tíð gjørdi hann av, at fara at royna nakað nýtt.

### Starvsfelagar yvirtaka

- Tað hevur alla tíðina verið meiningin, at tá Hans Laksá bleiv útbúgvin statsautoriseraður grannskoðari, skuldi eg taka meg aftur. Men eg havi ta áskoðan, at har sum eg eri, skal eg vera fult og heilt, og tí er tað ikki meiri enn rímiligt, at tá eg nú farið frá fyritøkuni, skal tað eisini verða fult og heilt. Og tað er tí eg havi gjørt av at selja mín part av fyritøkuni til starvsfólkið, sigur Klaus Rasmussen.

Hann átti á leið tveir triðingar av Rasmussen & Weihe, sum altso nú er seldur til starvsfólkið. Og tey ætla, sambært komandi stjóranum, Hans Laksá, at reka fyritøkuna víðari eftir sama leisti sum higartil. Sómuleiðis er ætlanin at varðveita sama navnið sum higartil – í hvussu er í fyrsta umfari.

Men tá Klaus Rasmussen so bleiv spurdur, um hann vildi halda fram sum nevndarformaður, játtaði hann hesum. So mann kann siga, at hann kortini ikki kvettur á stokkinum heilt.

Tíðin er tó komin til, at Klaus vildi royna nakað nýtt.

- Tað verður sagt, at tú fær ikki eitt nýtt starv eftir at tú ert fyltur 50, og tað geri eg næstu ferð, so skuldi tað verða, skuldi tað verða nú, sigur fráfarandi stjórin.

Men júst hvat nýggja